SEV

Postrúm 319
FO-110 TÓRSHAVN

Tórshavn, hin 14. mai 2004
Málnr.: 614-200100047-7
Tykkara málnr.:
Málsviðgeri: SP / Tlf.: 35 64 24

# Umhvørvisgóðkenning
**av**
# vindmyllum hjá SEV í Neshaga

Hendan umhvørvisgóðkenning av fýra vindmyllum hjá SEV í Neshaga, er givin við heimild í grein 26 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988, um umhvørvisvernd, og grein 1, stk. 4 í kunngerð nr. 54 frá 3. mai 1994, um at leggja eftirlits- og umsitingaruppgávur eftir umhvørvisverndarlógini til Heilsufrøðiligu starvsstovuna.

Góðkenningin fevnir um vindmylluna, sum varð sett upp í 1993, av slagnum Nordtank uppá 150 kW, og tríggjar vindmyllur av slagnum Vestas V 47 á 660 kW, sum ætlanin er at seta upp á sumri 2004.

## 1. Endamál

Endamálið við umhvørvisgóðkenningini er at fyribyrgja og avmarka dálking av luft, vatni og jørð, og at fyribyrgja larmvansum.

Herundir at leggja dent á:

a) Meginregluna um nýtslu og burturbeining: Minka nýtsluna – endurnýta – endurvinna – brenning við orkuendurvinning – burturbeining.

b) At umhvørvisliga best tøka tøknin (BAT[1]) í størst møguligan mun verður nýtt.

c) At virkið hevur innaneftirlit.

## 2. Góðkenningartreytir

Umhvørvisgóðkenningin er treytað av ásetingunum í fylgiskjali 1.

Harumframramt eru hesar treytir galdandi:

a) Boðast skal Heilsufrøðiligu starvsstovuni frá tá farið verður undir ætlanina. Gongur meiri enn eitt ár áðrenn farið er undir ætlanina, fellur umhvørvisgóðkenningin burtur.

[1] Best Available Techniques

## 3. Kæruvegleiðing

Hendan avgerð kann sambært grein 66 í løgtingslóg nr. 134 um umhvørvisvernd frá 29. oktober 1988 kærast til landsstýrismannin í umhvørvismálum. Kæran skal sendast Heilsufrøðiligu starvsstovuni, sum síðan sendir hana til landsstýrismannin við neyðugum skjølum.

Kærufreistin er 4 vikur frá tí degi, umhvørvisgóðkenningin er almannakunngjørd. Um kærufreistin er úti ein leygardag ella ein halgidag, verður kærufreistin longd til tann fyrstkomandi gerandisdagin.

Bárður Enni, stjóri

/

Jacob Pauli Joensen, deildarleiðari

**Hjálagt:** Fylgiskjal 1.

**Avrit:** Nes kommuna, 650 Toftir
Landslæknin, Sigmundargøta 5, Postrúm 9, FO-110 Tórshavn.

**Fylgiskjal 1**

## Góðkennningartreytir

### 1 Innrætting og rakstur

1.1 Virkið skal rekast og viðlíkahaldast soleiðis, at treytirnar altíð verða hildnar.

1.2 Øll øki, sum hoyra til virkið, skulu haldast ruddilig.

1.3 Øki, sum hoyra til virkið, skulu verða týðiliga avmerkt.

1.4 Virkið skal halda øll útlát so lág sum gjørligt, fyri at avmarka dálkingina mest møguligt.

1.5 Virkið hevur skyldu til altíð at nýta bestu tøku tøknina (BAT) fyri at minka mest møguligt um øll útlát, og skal tøka reinsiútgerðin altíð nýtast til fulnar.

1.6 Evni, ið verða nýtt, skulu hava minst møguligt árin á umhvørvið.

1.7 Um virksemið heldur uppat, skal alt tilfar og øll útgerð beinast burtur.

### 2 Goymslur

2.1 Evni og tilfar, ið kunnu dálka, skulu goymast soleiðis, at einki útlát til umhvørvið kann fara fram. Goymslur skulu innrættast soleiðis, at møguligir lekar og spill kunnu haldast aftur.

2.2 Evni, ið eru á goymslu uttandura, skulu vera í íløtum, sum eru góðkend til uttandura goymslu av viðkomandi evni.

### 3 Óljóð, ristingar og ljós

3.1 Alt virksemi skal fara fram soleiðis, at tað ikki hevur við sær ampar av óljóði, ristingum, ljósi ella geislingum.

3.2 Tað ekvivalenta, korrigeraða óljóðstøðið frá vindmyllunum skal við næsta grannamark ikki fara upp um 45 dB(A).

3.3 Á økjum, ið verða nýtt til ella eru ætlað til bústaðir, stovnar, summarhús ella onnur frítíðarendamál, skal óljóð frá myllunum ikki fara upp 40 dB(A) .

3.4 Um ampar verða av óljóði, ristingum, ljósi ella geislingum, skulu neyðug tiltøk setast í verk til eitt støði, ið Heilsufrøðiliga starvsstovan kann góðtaka.

### 4 Burturkast

4.1 Alt burturkast skal handfarast í samsvari við galdandi reglur um burturkast2.

4.2 Burturkast skal goymast soleiðis at tað ikki er til ampa.

4.3 Burturkastið skal latast góðkendum móttakara, og skal skiljast sambært ásetingum móttakarans.

---

[2] Kunngerð nr. 147 frá 19-10-1995, um burturkast

## 5 Óhapp

5.1 Henda dálkingaróhapp, skulu beinanvegin setast í verk tiltøk til avmarking og upprudding.

5.2 Størri útlát ella dálking skal beinanvegin fráboðast til umhvørvisdeildina á Heilsufrøðiligu starvsstovuni. Eisini skal ein frágreiðing um møgulig tiltøk til upprudding v.m. sendast umhvørvisdeildini á Heilsufrøðiligu starvsstovuni.3

## 6 Innaneftirlit

6.1 Virkið skal alla tíðina tryggja sær, at treytirnar í hesi góðkenning verða hildnar, um neyðugt við at gera egnar mátingar og skrásetingar.

6.2 Heilsufrøðiliga starvsstovan kann krevja skjalprógv fyri, at treytirnar í 2. parti, um óljóð, ristingar og ljós, verða hildnar.

6.3 Heilsufrøðiliga starvsstovan kann krevja, at kanningar verða gjørdar fyri at meta um møgulig dálkingarárin frá virkinum.

6.4 Sýnistøkur og kanningar skulu gerast av persóni ella felag, sum Heilsufrøðiliga starvsstovan kann góðtaka.

6.5 Sýnistøkur og kanningar skulu gjaldast av virkinum.

## 7 Rakstrarskráseting

7.1 Hesar upplýsingar skulu skrásetast:

7.2 Elframleiðsla

7.3 Avhendaðar nøgdir av burturkasti við tilskilan av slagi og móttakara

7.4 Óhapp, sum hava havt útlát ella vanda fyri útláti við sær

7.5 Annað av umhvørvisligum týdningi

7.6 Úrslit og eygleiðingar (checklistar) í sambandi við innaneftirlit

7.7 Skrásetingarnar skulu goymast í minsta lagi í 5 ár, og teir skulu vera til taks hjá eftirlitsmyndugleikanum

7.8 Virkið skal eftir umbøn frá Heilsufrøðiligu starvsstovuni senda inn rakstrarskrásetingar, úrslit av mátingum o.a. í hóskandi sniði og uppseting

7.9 Heilsufrøðiliga starvsstovan kann krevja aðrar skrásetingar enn tær, ið eru nevndar undir 7.1

[3] Dálkingaróhapp skulu eisini fráboðast til Løgregluna (dálking á landi) ella til Sjóbjargingarstøðina, MRCC-Tórshavn (dálking á sjónum).

## 8 Almennar treytir

8.1 Virkið má ikki víðkast ella broytast byggifrøðiliga ella rakstrarliga á ein hátt, ið nertir við dálkingarviðurskifti virkisins, fyrr enn nýggj góðkenning er givin til hesa víðkan ella broyting.

8.2 Eitt eintak av hesi góðkenning skal altíð vera tøkt á virkinum. Øll viðkomandi starvsfólk skulu kenna innihaldið í góðkenningini og vita, hvar góðkenningin er til taks.

8.3 Eigaraskifti, navnabroyting eller avtøka skal fráboðast Heilsufrøðiligu starvsstovuni.

8.4 Heilsufrøðiliga starvsstovan hevur eftirlitið við virkinum. Eftirlitið verður útint sambært kap. 7 í umhvørvisverndarlógini.

8.5 Í 5 ár aftaná at góðkenningin er givin, kunnu nýggjar treytir bert ásetast, um so er, at:

8.6 nýggjar upplýsingar eru komnar fram um dálkingarskaðaárin.

8.7 dálkingin elvir til umhvørvislig skaðaárin, ið ikki kundu síggjast frammanundan, tá ið góðkenningin varð givin.

8.8 dálkingin í aðrar mátar verður størri enn hon, ið góðkenningin er givin eftir.

8.9 Tá ið meira enn 5 ár eru gingin eftir góðkenningina, kann Heilsufrøðiliga starvsstovan broyta treytirnar í hesi, tá ið tað er umhvørvisliga grundað, ella um betri reinsingarhættir ella minni dálkandi framleiðsluhættir eru komnir fram.

8.10 Henda góðkenning tekur ikki støðu til, um tað er neyðugt við góðkenning eftir aðrari lóg.